Suðuroyarleiðin:

# - Tað er ov seint at »vakna«, tá ið tokið er farið

**Ingeborg Vinther, sum regluliga hevur ferðast um Suðuroyarfjørð í meira enn 25 ár, ávarðar ímóti líkasælu um Suðuroyarleiðina og vísir á, at enn er vón fyri stavn hjá okkara syðstu og mest fjarskotnu oyggj. - Men hetta krevur forstáilsi og vælvild, og tað krevur, at myndugleikarnir framhaldandi síggja Suðuroynna sum ein part av føroyska samfelagnum. Tað er ov seint at "vakna", tá ið tokið er farið. Nú vit fáa ein nýggjan Smyril, er møguleikin góður at draga Suðuroynna nærri miðstaðarøkinum, sigur hon**



*- Sum partur av samfelagnum liggur Suðuroyggin longur burtur enn hinar oyggjarnar, og tí mugu vit rokna við, at hendan farleiðin verður dýrari enn aðrar at reka. Men her verður neyðugt at gjalda tað, sum tað kostar framhaldandi at hava Suðuroynna við sum partur av samfelagnum, sigur Ingeborg Vinther*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

PRÁT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein av teimum, sum hevur siglt um Suðuroyarfjørð við Smyrli í mong ár, er Ingeborg Vinther, sum er vágbingur og formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon hevur verið í leiðslu FA's í samfull 28 ár, og 27. apríl í ár hevði hon 25-ára "jubileum" sum formaður í størsta fakfelagnum hjá teimum, sum eitt nú stríðast á fiskavirkisgólvunum, á bryggjuni og við vegjaðaran.

Ingeborg býr í Vági, og øll hesi ár hevur hon siglt um Suðuroyarfjørð at kalla hvørt vikuskifti við Smyrli.

- Longu tey fyrstu árini, tá ið eg gjørdist stjórnarlimur í FA, byrjaði eg at ferðast norður um fjørðin til fundar, men tá vóru túrarnir ikki so nógvir, sum tá ið eg gjørdist formaður.

Hon sigur, at starvið sum formaður í Føroya Arbeiðarafelag hevur kravt, at hon hevur verið á skrivstovu felagsins gjøgnum vikuna.

- Eg fari vanliga norður til Havnar mánadag og suður aftur um fjørðin fríggjadag. Alt eftir, hvat er á skránni á skrivstovuni og í felagnum annars, avgeri eg, hvørja tíð á degnum eg fari um fjørðin, bæði mánadag og fríggjadag.

## Ógvuliga spent

Sosialurin hitti Ingeborg, tá ið hon var á veg suður um fjørðin hetta seinasta vikuskftið, sum gamli Smyril er í regluligari sigling.

- Jú, eg eri ógvuliga spent upp á nýggja og snotuliga skipið, sum nú fer í sigling komandi mánakvøld – og eg gleði meg ómetaliga nógv til hesar nýggju umstøðurnar, sigur hon.

Ingeborg sigur, at hon hevur avgjørt at fara norður um Suðuroyarfjørð á seinastu ferðini hjá gamla Smyrli, sum verður mánadagin klokkan 15.30 av Drelnesi.

- Sjálvandi verður hetta við blandaðum kenslum, nú hetta verður seinasti túrurin eftir so mong ár, men frøin um nýggja skipið er so mikið størri enn harmurin um, at gamli Smyrli nú verður lagdur.

## Hevur tænt væl

Hon heldur, at gamla skipið hevur roynst ógvuliga væl hesi árini, tað hevur verið álitið hjá suðuroyingum og øðrum, sum hava ferðast um fjørðin.

- Skipið hevur mangan brattan farið øll hesi mongu ár. Eg eri ikki bangin at sigla, og eg fái vanliga ikki sjóverk. Flestu túrarnir hava verið góðir, men tað eru eisini teir, sum hava verið rættiliga buldrasligir.

Ingeborg minnist tann eina túrin norður um fjørðin eftir eitt landsynningsbrim fyri fleiri árum síðan, sum eitt nú gjørdi skaða á molan í Havn.

- Í Skopunarfirði legði Smyril seg so langt einar tvær ferðir, at tú ivaðist í, um hann yvirhøvur mundi fara at reisa seg aftur. Hendan dagin endaðu vit inni á Skálafjørðinum og sluppu ikki inn á Havnina fyrr enn langt út á seinnapartin.

Hon heldur, at gamli Smyril hevur verið eitt óføra gott skip – og hevur øll árini havt eina serstakliga lagaliga og fryntliga manning, sum hevur dugað ógvuliga væl við ferðafólkinum.

- Eg havi bara gott at bera teimum øllum – heilt úr maskinrúminum og upp á brúnna. Øll hava tey gjørt sítt besta fyri, at ferðafólk kundu føla seg væl umborð. Tey hava verið hjálpsom og fyrikomandi. Hetta hevur heilt avgjørt sett sín dám á hesa Føroya longstu farleið og hevur verið við til at gjørt, at alt hevur gingið so ótrúliga væl, sum tað nú einaferð hevur.

## Ingeborg vísir á, hvussu Stóran ómak

stóran ómak teir, sum starvast á dekkinum, hava gjørt sær við eitt nú at fáa allar bilarnar umborð, tá ið nógvur flutningur hevur verið.

- Her ræður eingin tilvild. Alt plássið verður brúkt, soleiðis at eingin óneyðuga stendur eftir á bryggjuni, tá ið loyst verður.

Hon heldur fyri, at hesir menn kortini hava fingið manga skoluna, tá ið fult var, og allir bilarnir ikki sluppu við.

- Men teir vóru púrasta ósekir. Teir gjørdu sítt besta, og síðan fingu teir ikki gjørt meira. Men soleiðis er lívið nú einaferð, leggur hon aftrat.

Nú nýggi Smyril fer í sigling komandi mánakvøld, fegnast Ingeborg um, at Suðuroyggin endiliga fær lut í menningini, sum verið hevur á samferðsluøkinum í Føroyum seinastu árini.

- Tað er bara harmiligt at hoyra menn í dag tosa um, at nýggja skipið er ov stórt. Hetta ljóðar undarligt í mínum oyrum, tí skipið, sum vit nú hava fingið, er ikki størri enn tað, teir sjálvir hava biðið um.

Hon ivast onga løtu í, at ferðafólkastreymurin og flutningurin annars verður væl størri við nýggja skipinum enn við tí gamla.

- Tað vísir seg allastaðni, at har tú veitir eina betri tænastu, fara fólk at ferðast meira, og soleiðis verður eisini á farleiðini um Suðuroyarfjørð. Kanska fara vit ikki at síggja hetta beinanvegin, men sum várið og summarið aftur fara at nærkast, ivist eg onga løtu í, at nýggja skipið onkuntíð kemur at standa sína roynd.

Ingeborg vísir á, at hóast Smyrli ikki hevur so stóran "belegning" gjøgnum alla vikuna, er hann mangan ov lítil í vikuskiftinum, og tá ið serlig tiltøk eru sum gera, at fólk ferðast meira.

Hon heldur, at túratalið hjá nýggja skipinum avgjørt eigur at verða økt, soleiðis at skipið fleiri dagar í vikuni – um ikki endiliga allar, ger tríggjar túrar.

## Umsitingin

- Farleiðin um Suðuroyarfjørð er lívæðrin – ella sum onkur hevur sagt, "koyrivegurin" hjá suðuroyingum, og tí haldi eg avgjørt, at øll umsitingin av hesi farleið eigur at liggja í Suðuroy.

Hon heldur, at politisku umboðini á løgtingi og í landsstýri, sum Suðuroyggin hevur, hava gjørt alt ov lítið við at ávirka og fremja hetta mál, soleiðis at umsitingin av Suðuroyarleiðini kann liggja í Suðuroy.

- Sjálvsagt vita suðuroyingar best, hvør tørvurin er, og hvat tænir oynni best. Støðan í oynni er soleiðis vorðin, at vit hava einki at missa, men alt at vinna, og tí er ongantíð ov skjótt, at øll umsitingin av siglingini um Suðuroyarfjørð verður løgd í Suðuroy.

Ingeborg vísir á, at soleiðis, sum landið er vorðið geografiskt, er neyðugt, at Suðuroyggin fær tað, hon hevur uppiborið.

- Sum partur av samfelagnum liggur Suðuroyggin longur burtur enn hinar oyggjarnar, og tí mugu vit rokna við, at hendan farleiðin verður dýrari enn aðrar at reka. Men her verður neyðugt at gjalda tað, sum tað kostar framhaldandi at hava Suðuroynna við sum partur av samfelagnum.

## Líkasæla

Hon ávarðar ímóti líkasælu og vísir á, at enn er vón fyri stavn hjá okkara syðstu og mest fjarskotnu oyggj.

- Men tað krevur forstáilsi og vælvild, og tað krevur, at myndugleikarnir framhaldandi síggja Suðuroynna sum ein part av føroyska samfelagnum. Tað er ov seint at "vakna", tá ið tokið er farið. Betur er at binda um heilan fingur, og nú vit fáa ein nýggjan Smyril, er møguleikin góður at draga Suðuroynna nærri miðstaðarøkinum, sigur Ingeborg Vinther.

